# Ítróttarblaðið

**Ítróttartoymið á Sosialinum:**


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo



## FC Suðuroy skiftir venjara

Jón Pauli Olsen verður ikki venjari hjá FC Suðuroy í 2011. Tað skrivar heimasíðan hjá felagnum. Besta liðið flutti niður úr Vodafonedeildini í ár. Tað var eisini Jón Pauli Olsen, sum stóð á odda fyri liðnum, sum flutti upp í bestu deildina í 2009. – FC Suðuroy takkar Jón Paula fyri gott arbeiði og gott samstarv, skrivar heimasíðan.

**»** Vit hava eitt nóg stórt inntøku-grundarlag til at flyta felagið frameftir í løtuni

DAVID FAIRCLOUGH

**»** Tað er ongantíð stuttligt at siga venjarar úr starvi

NIELS PETER BECH

**»** Vit vilja gjarna spæla høgt uppi á vøllinum, og spæla tann fótbóltin, sum áskoðarnir dáma at hyggja eftir

HEÐIN ASKHAM




*Nýggi spælarin, hjálpar- og ungdómsvenjarin hjá AB, Milan Kuljic, saman við AB-formanninum, Andrass Drangastein, eftir at tvey ára sáttmálin var undirskrivaður leygardagin*

*Mynd: Terji S. Johansen*

# Milan Kuljic skal hjálpa AB

**FÓTBÓLTUR** Næstu tvey árini skal serbiski miðvallarin vera ungdómsvenjari hjá AB, samstundis sum hann skal spæla við besta liðnum og vera hjálparvenjari

Hilmar Jan Hansen

Milan Kuljic hevur verið rættiliga drúgvur í føroyskum fótbólti. Hann kom til VB í 1998, og hevur síðani – burtursæð frá smávegis steðgum – spælt fótbólt í Føroyum, tey seinnu árini við HB. Men eftir at hava vunnið annað meistaraheitið á rað við HB, skiftir hann nú til AB, sum komandi ár skal spæla í næstbestu deildini.

– Eg vildi sera gjarna royna nakað nýtt, og fyri meg er AB akkurát tað rætta júst nú. Næsta summar fái eg prógv sum A-venjari, so tí verður tað gott hjá mær at hava fleiri venjarauppgávur í einum felag sum AB, segði Milan Kuljic, eftir at hann leygardagin hevði skrivað undir ein sáttmála fyri næstu tvey árini.

– At eg sum spælari flyti eina deild niður, hevur ikki so nógv at siga. Eg eri 34 ára gamal, men væl fyri, og eg haldi eisini, at eg kann geva AB nakað sum spælari. Men tað er eisini ótrúliga spennandi at fáa ein nýggjan leiklut, har venjingin fyllir meira.

### Argjamenn fegnir

Argjamenn eru eisini fegnir um at fáa Milan Kuljic út á Argir komandi tvey árini, har hann hjálpa Sámal Erik Hentze við venjingini av fyrstaliðnum og sjálvur spæla við, umframt at taka sær av ungdómsvenjingini.

– Fyri okkum hevði tað sera nógv at siga, at vit fingu ein góðan ungdómsvenjara, tí tað hava vit raðfest sera frammarlaga. Vit eiga nógvar og góðar spælarar, sum eru á veg, so eru vit sera glað fyri, at Milan kann taka eina hond í hjá okkum næstu tvey árini, sigur formaðurin í AB, Andrass Drangastein

– Tað er heldur eingin loyna, at vit hava sum mál, at besta manslið okkara ikki skal dvølja meira enn hetta eina árið í næstbestu deildini. So, umframt at Milan kann hjálpa okkum við komandi ættarliðnum, ger tað tað ikki verri, um hann eisini kann hjálpa okkum til eina skjóta uppflyting.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva...

*»Spælararnir úr Team Klaksvík hava enn nógv at læra, og tað sæst tíðuliga, at liðið ikki enn megnar leikferðini í bestu deildini, og tað, at málverjarnir og verjurnar eru betur.«*

**www.neistin.fo**

*»Verjan stóð seg minni væl. Alt ov ofta sluppu kollfirðingar ígjøgnum verjuna við einføldum fintum ella við at spæla Gert Hansen á strikuni frían. Erlendur og Magnus høvdu tí ongan léttan dyst í málinum.«*

**www.kyndil.fo**

*»Ársins venjari bleiv Birnir Haukson, sum hevur verið venjari hjá Skála. Hann tók yvir eftir Ingun Hansen, ið valdi at fara til Víking. Hann hevur gjørt eitt gott arbeiði á Skála, har liðið spældi seg fram til steypafinaluna, har tær máttu lúta fyri KÍ.«*

**www.kvinnufotbolt.com**